# Skeið um demens á Hafnia

**Kenda danska kvinnan á økinum, Jane Verity, sum býr í Australiu, fer at halda fyrilestrar og greiða frá um, hvussu fólk, sum arbeiða við dementum, kunnu verða við til at skapa sjúklingum eina betri tilveru**

DEMENS
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Alzheimerfelagið fer nú saman við øðrum at skipa fyri skeiði fyri fólki, sum arbeiða við dementum og røktarsjúklingum annars.

Skeiðið verður 1. og 2. juni á Hotel Hafnia, og tað verður kenda danska kvinnan á økinum, Jane Verity, sum fer at halda fyrilestrar og greiða frá.

### "Livsgnisten"

Í greinum í donskum bløðum verður Jane nevnd "senilitets-konsulentur", og onkur av yvirskriftunum í bløðunum sigur, at Jane Verity "gi'r demente livsgnisten igen…"

Síðan 1987 hevur hon búð í Australiu, har hon hevur ferðast og hildið skeið um dement. Hon hevur eisini ferðast í øðrum londum – og nú kemur hon so til Føroya.

### Lívsstílur

Jane Verity hevur líka sum gjørt tað til sín "lívsstíl" at kunna fólk, sum arbeiða við dementum, um sjúkuna.

Luttøkugjaldið til skeiðið á Hotel Hafnia er kr. 2000, sum fevnir um tveir skeiðsdagar við vistarhaldi, sum er mongunmatur, døgurði og kaffi.

Dagin eftir, at skeiðið er liðugt, verður almennur fundur um evnið, demens.

### Kunning

Tey, sum vilja vita meira um skeiðið, kunnu venda sær til Sigrún Mohr, formann í Alzheimerfelagnum ella Margaret Johannesen, sum hevur holla vitan um demens og ferðast kring um landið at greiða frá um sjúkuna.



# Demens – sjúkligar í heilavevnaðinum



*Sigrún Mohr er formaður í Alzheimerfelagnum. Bygningurin á myndini er Heimið á Mýruni, sum er heim fyri dement*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Margaret Johannesen, sum hevur hildið fyrilestrar fyri fólki, ið arbeiða við dementum ella minnisveikum, hevur í sambandi við hetta arbeiði savnað ymiskt tilfar um sjúkuna. Vit fara á hesum síðunum at endurgeva nakað av tí, sum hon hevur savnað**

DEMENS
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Demens er heilasjúka – ella heilasjúkur, sum raka 1. andsevnini, 2. kenslulívið og 3. persónligheitina hjá fólki.

Tá ið sjúkan rakar andsevnini, viknar minnið, serliga fyri tí nýliga upplivaða. Samanumtikið kunnu vit siga, at tey intellektu evnini vikna; tann sjúki hevur verri bindindi, dømikraft, yvirlit og fyrilit.

Rakar sjúkan í øðrum lagi kenslulívið, viknar tamarhaldið, og sjúklingurin gerst kenslusvingandi, illur í sær, apatiskur og uppsteðgaður.

Í triðja lagi kann sjúkan eisini raka persónligheitina, og tá gerst sjúklingurin meira primitivur; atburðurin kann skapa trupulleikar, tá lítið fyrilit verður tikið fyri øðrum fólki.

### Sjúkueyðkenni

Í stuttum kann sigast um demens, at sjúkan er eitt "savn" av sjúkueyðkennum, sum siga okkum, at virksemið í heilanum er viknað.

Sjúkueyðkennini kunnu eitt nú vera "gleppandi" minni, vantandi evni til at ogna sær lærdóm, tvørrandi hugsavning ella konsentratión, vantandi taluevni og dømikraft.

Hetta hevur við sær broytingar í persónleika, atburði og sinnisrørslum, sum kunnu elva til ranghugsan, hallusinatiónir, aktivitetsólag, aggressivitet, broytingar í samdøgursrytmuni, hýrissvingningar, tunglyndi, angist og fobiir.

Demens snýr seg soleiðis um heilasjúkur – sjúkligar broytingar í heilavevnaðinum og ikki, sum áður hildið, um vanligar aldursbroytingar.

Við løttum demensi verður vanligt dagligt virksemi ávirkað. Er demensurin "moderatur", sum tað verður rópt, kann sjúklingurin ikki klára seg uttan hjálp frá øðrum – og er demensurin trupul, er neyðugt, at sjúklingurin fær støðuga røkt og er undir uppsýni.

### Falskur demensur

Sjúkur, sum kunnu hava somu sjúkueyðkenni sum demensur, eru vætutrot, bløðrubruni, tunglyndi, ørskapur, trot á B12-vitamunum og sjúkur í evnisbroytingini. Í slíkum føri verður tosað um pseudodemens (falskan "demens") í mun til ektaðan demens.